## Øði um pornomessu

Í næsta mánað verður ein pornomessa í Reykjavík, men íslendsku politikararnir eru als annað enn fegnir um tiltakið. Málið verður mett so álvarssamt, at tað bleiv umrøtt í Altinginum í gjár. Millum teirra, sum tóku orðið, var forsætisráðharrin, Geir Haarde, og hann lat ongan iva um vera um, at hann er ímóti tiltakinum. Tað sama hevur Vilhjálmur Vilhjálmsson, borgarstjóri, sagt, og hann umhugsar at banna pornomessuni.

## Fáa ikki bíligari øl

Í seinastuni hava røddir í Svøríki mælt stjórnini til at lækka avgjøldini á víni og øli. Millum teirra, sum hava tikið undir við tankanum, eru fleiri borgarligir politikarar, men í gjár gjørdi borgarligi forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, greitt, at stjórnin fer ikki at lækka avgjøldini. Tey, sum taka undir við at lækka avgjøldini, siga, at tað er neyðugt fyri at tálma tí stóra ølinnflutninginum, men Fredrik Reinfeldt sigur, at tað er ikki pláss fyri lækking á fíggjarlógini.

# Føroyingar brynja seg út til at basa fuglakrími



*Føroyingar eru nú rættiliga væl brynjaðir at taka ímóti eini umfarsótt av fuglakrími, skuldi tað hent, at hon fer at gera um seg*

**Í farnu viku skrivaði landsapotekarin undir sáttmála sum tryggjar okkum rætt til nóg mikið av koppsetingarevni til at koppseta helvtina av øllum føroyingum fyri fuglakrím**

FUGLAKRÍM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyingar hava nú tikið eitt týdningarmikið stig í royndunum at basa fuglakrími, skuldi tað ringasta hent og tað gerst ein heimsumfatandi farsótt.

Í farnu viku skrivaði Heri Mørkøre, landsapotekari, undir sáttmála við altjóða heilivágsfyritøkuna, GlaxoSmithKline, um at fáa koppsetingarevni.

Landsapotekarin sigur, at sáttmálin tryggjar føroyingum forkeypsrætt til umleið 48.000 skamtir av koppsetingarevninum.

Tað er nóg mikið til at koppseta helmingin av Føroya fólki, tí hvørt fólk skal koppsetast tvær ferðir.

Men hetta merkir ikki, at tað ber til at hava koppsetingarevni á goymslu, so at vit eru til reiðar at koppseta fólk, beinanvegin ein umfarsótt tekur seg upp.

Hetta er ein virus, sum broytist alla tíðina og sostatt ber ikki til at fara undir at gera koppsetingarevni, fyrrenn talan er um eina heimsfarsótt, so at vit vita, hvussu tað sær út akkurát tá.

### Eisini til hina helvtina

Samstundis sum vit longu hava skrivað undir sáttmála um koppsetingarevni til annanhvønn føroying, verður nú eisini arbeitt við at útvega koppsetingarevni til hina helvtina av fólkinum.

Landsapotekarin hevur lagt eitt tilmæli fyri Almanna- og heilsumálaráðið um at fáa heimild til eisini at útvega koppsetingarevni til hina helvtina av fólkinum.

Sostatt er ætlanin at útvega okkum forkeypsrætt til eina 48.000 skamtir afturat.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sigur, at tilmælið er til viðgerðar í umsitingini. Men hann ivast ikki í, at Landsapotekarin fær hesa heimildina og at hetta verður avgreitt ein av næstu døgunum.

– Vit kunnu ikki liva við, at vit bara hava koppsetingarevni til helvtina av føroyingum. Tí skulu vit eisini hava koppsetingarevni til hina helvtina av fólkinum, sigur hann.

Men harafturat eru Føroyar eisini við í eini norðurlendskari ætlan um at framleiða kopsetingarevni, skuldi tað verið neyðugt.

– Sostatt eru vit tryggjað so væl sum tilber, tí vit hava bæði tryggjað okkum forkeypsrætt til koppsetingarevni til allar føroyingar, samstundis sum vit eru við í eini norðurlendskari tilbúgvingarætlan, sum hevur til endamáls at fara undir at framleiða meiri koppingarevni og onnur sløg av koppingarevni, skuldi tað verðið neyðugt.

### Tilbúgving klár

Harafturat hava føroyingar gjørt okkara egnu tilbúgvingarætlan, skuldi tað hent, at Fuglakrímið verður til eina heimsumfatandi umfarsótt.

Hans Pauli Strøm sigur, at hendan tilbúgvingarætlanin ásetir ábyrgdarbýtið ímillum ymsar stovnar, verða vit rakt av eini slíkari umfarsótt.

Samstundis ásetir hendan tilbúgvingin, hvørji tiltøk skulu setast í verk, tá ið ein heimsfarsótt við fráboðað.

Millum annað verður ásett, hvussu tey skulu fyrihalda seg á flogvøllinum og á sjúkrahúsunum. Tað er eisini ásett, hvussu farast skal fram um so er, at fólk skulu avbyrgjast heima og hvør skal avbyrgjast heima ella skal í karantenu.

– Føroyar vóru í veruleikanum fyrsta norðurlandið, sum hevði eina slíka tilbúgvingarætlan, sigur Hans Pauli Strøm.

– Úrslitið av hesi tilbúgvingini og tað at vit hava tryggjað okkum koppsetingarevni, ger, at føroyingar eru rættiliga væl brynjaðir, skuldi Fuglakrímið verðið til eina heimsfarsótt, sigur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum.

– Okkara Heilsuverk og okkara apoteksverk hevur arbeitt fyrimyndarliga á hesum øki, so at vit eru væl fyrireikað at taka ímóti hesi avbjóðingini, skuldi hon komið, leggur hann afturat.

# Ílagi at prísurin á byggilendi hækkar

**– Eg havi onki ímóti at prísurin á jørð, verður endurskoðaður, men tað skal gerast við varsemi og landið skal ikki hava okurspris, sigur Bjarni Djurholm**

BYGGILENDI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– At prísurin á byggilendi verður gækkaður, hevur ikki so nógv at siga fyri tann einstaka.

Tað Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, sigur at hann hevur onki ímóti, at Búnaðarstovan ætlar at dagføra prísin á jørð.

Í Sosialinum í gjár skrivaðu vit, at ætlanin er at hækka prísin á jørð og at tað fer at vera eitt bakkast hjá teimum, sum skulu byggja.

Vit søgdu, at gongur, sum ætlað hjá Búnaðarstovuni, fer eitt grundstykki í Havn at vera einar 40.000 krónur dýrari.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at tað er skeivt at blanda hann upp í, tí hetta er ikki eitt mál, sum er á borðinum hjá Vinnumálaráðnum.

– Hetta er eitt mál, sum Búnaðarstovan arbeiðir við, sigur hann.

Men Vinnumálaráðið er kærumyndugleiki og tí kann tað henda, at tað endar á borðinum hjá landsstýrismanninum. Men fyrrenn tað hendir, hava vit onki við málið at gera.

Men Búnaðarstovan er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum og stovan hevur vent sær til Vinnumálaráðið og boðað frá, at ætlanin er at dagføra prísin á jørð, Tí teir eru ikki dagførdir síðani fyrst í sjeytiárunum.

– Vit hava boðað frá, at vit hava onki ímóti at prísirnir verða dagførdir, tí tað eru teir ikki blivnir í yvir 30 ár og hevur sostatt heldur ikki fylgt prístalinum, sigur Bjarni Djurholm.

Men Vinnumálaráðið hevur eisini boðað frá, at hetta skal gerast við varsemi.

– Tey, sum longu hava søkt um jørð og tey, sum hava hava eina væl grundaða vón um at fáa jørð fyri gamlan prís, skulu hava jørð fyri gamlan prís.

– Landið skal heldur ikki okra jørð og tí skal prísurin ikki vera so høgur, at hann forðar fyri menning og útbygging. Tí haldi eg, at jørðin skal seljast sum bíligt, sum tilber.

Bjarni Djurholm leggur afturat, at eftirlit eigur eisini at vera við, at lendið, sum er keypt frá tí almenna, veruliga verður brúkt til tað endamál, sum tað er keypt til.

Men av tí, at Vinnumálaráðið ikki er partur í málinum enn, kennir hann heldur onki til, hvussu nógv ætlanin er at hækka prísirnar kring landið.

Um Hetta fer at gera tað torførari hjá kommunum at útvega grundstykki, hevur hann onga viðmerking til.

Men bæði borgarstjórin í Havn og varaborgarstjórin í Runavík, vísa á, at tað er alt ov ósmidligt at fáa jørð til bygging, tí tað gongur ov long tíð.

Teir halda, at tað einasta rætta er at kommunurnar fáa framíhjá rætt til lendið, sum liggur í byggiøkinum í býarætlanunum og so skulu grundstykkini fella til gjaldingar, so hvørt tey verða seld.

– Hetta er ein ítøkilig atfinning ímóti Búnaðarstovuni, sum tey mugu svara fyri, sigur Bjarni Djurholm.

Hann veit heldur ikki um tað í sær sjálvum er uppgávan hjá tí almenna at tryggja bíligt byggilendi so at frívirðið verður størri enn hjá einum, sum keypir privat grundstykki fyri mangt slíkt.

Landstýrismaðurin vísir eisini á, at úti á bygd er tað vanligt, at kommunur ikki gera so nógv burturúr byggibúningini,sum kommunan Havn ger. Harafturat er eisini vanligt, at kommunur átaka sær ein part av kostnaðinum fyri byggibúningina og sostatt selja grundstykkini við halli fyri at eggja fólki at seta búgv.

Sostatt heldur hann, at undir øllum umstøðum er prísurin, sum landið tekur fyri byggilendi, ein ógvuliga lítil partur av sethúsabygginingini.